# NSÍ hevur verið í Hvalba og hvest seg

**Jógvan Martin Olsen roknar HB at hava fleiri góðar einstaklingar, meðan hansara lið meiri hvílir á kollektivinum**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*Tað verða uttan iva nógvir áskoðarar til steypafinaluna Ólavsøkudag. Tá ið Gert Langgaard og Hallur Danielsen dystaðust um steypið fyri tveimum árum síðani, vóru oman fyri 4.000 áskoðarar á Tórsvølli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyrrapartin í gjár kom NSÍ til hús aftur, eftir at teir síðani leygardagin høvdu verið í Hvalba og fyrireikað seg til steypafinaluna ímóti HB, sum verður á Tórsvølli í morgin klokkan fýra. Í kvøld klokkan tíggju hittast NSÍ arnir aftur. Teir fara at halda til í hølunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, inntil teir eftir døgurða í morgin fara til Havnar.

Í Hvalba vandu teir í NSÍ tvær ferðir sunnudagin og tvær ferðir mánadagin. Ætlanin var at spæla venjingardyst ímóti Royn mánakvøldið, men hann varð avlýstur. Fleiri spælarar vóru plágaðir av smáskaðum, so tað var ikki hildið ráðiligt at leggja so nógv fyri. Allir NSÍ spælararnir eru tøkir uttan Sjúrður Jacobsen, sum er leikbannaður.

### Samhaldsfesti

NSÍ venjarin, Jógvan Martin Olsen, kennir allar fótbóltsspælarar í Føroyum. Hann er hjálparvenjari á landsliðnum hjá Henrik Larsen, sum verður í Gundadali í morgin. Bæði fyri landsliðið og sum NSÍ venjari fylgir Jógvan Martin væl við. Tá ið vit spyrja hann, hvør munurin er millum liðið hjá honum og HB liðið, so svarar hann soleiðis:

– HB hevur eftir føroyskum umstøðum nógvar framúr spælarar. Jákup á Borg, Rógvi Jacobsen og Heine Fernandez kunnu allir einsamallir avgera, og har eru fleiri aðrir eisini. Okkara avrik og harvið úrslit er kanska meiri treytað av, at alt liðið sum tað er stemmar, um tað ber til at siga tað soleiðis. Sjálvandi er tað eisini hjá HB talan um liðavrik, men eg haldi ikki, at vit hava individualistarnir av sama slagi, sum teir hava tað, er metingin hjá Jógvani Martin Olsen.

*Hvussu eru tit fyri?*

– Vit eru so væl fyri, sum tað ber til hjá okkum at vera. Aftaná hálvfinaluna ímóti ÌF 4. juli høvdu spælararnir frí í knappar tvær vikur. Síðani høvdu vit tunga fysiska venjing í eina viku. Nú hava vit havt sum mál at fáa bóltførleikan og taktiska spælið at rigga. Tað hevur gingið rætta vegin, men dystarvenjingin er sjálvandi ikki, sum hon er, tá ið vit spæla eina og fleiri ferðir um vikuna.

NSÍ hevur síðani teir fóru undir aftur venjingarnar spælt tveir venjingardystir á heimavølli. Fyrst vunnu teir 2-1 á KÍ, og so vunnu teir 4-0 á ÍF Føroyum.

Tá ið vit tosa við Jógvan Martin um munin í fyrireikingunum hjá HB og NSÍ, heldur hann, at tað kann síggjast frá fleiri síðum.

– Okkara spælarar høvdu frí í tvær vikur. At hava fingið hvíld eigur at geva sinniligt yvirskot, men tað gongur út yvir førleikan á øðrum økjum. HB hevur verið í trimum stórum avbjóðingum síðani seinnu hálvfinaluna. Teir hava spælt ímóti FCK og tvær ferðir í Europa Cup. Allir dystirnir hava verið á grasi. Tað hevur verið góð fyrireiking. Spurningurin er so, um teir sinniliga eru troyttir. Tað bendi avrikið á heimavølli ímóti WIT ikki á. Eg sá tann dystin, og talan var í 2. hálvleiki um framúr HB avrik, sum teir megnaðu uttan Heine Fernandes, Rógva Jacobsen og Jákup á Borg. Vit hava stóra virðing fyri teimum, men vit halda okkum vera væl fyri.

*Um tú sammetir við fyri tveimum árum síðani, tá ið tit vunnu 2-1á teimum í finaluni?*

– Vit eru betri fyri enn tá. Men tað er HB ivaleyst eisini. Teir vunnu 1-0 á okkum í landskappingini undan summarfrítíðini. Tað var uppiborið. Men tá skal havast í huga, at vit mistu ein mann. So nú fáa vit at síggja. Vit eru so væl fyrireikaðir, sum tað ber til. Vit trúgva upp á møguleikan, og vit hava gott mót. Men vit vita, at alt liðið skal spæla upp til sítt besta, um tað skal eydnast at vinna.

# Jákup rennur kapp við tíðina

**Trupulleikin hjá HB spælaranum er, at hann framvegis hevur nógva pínu, tá ið hann roynir at renna, men hann sigur seg hava stórt álit á liðfeløgunum, sum er góð blanding av royndum og minni royndum spælarum, ið hava framúr vinnaravilja**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

HB eigur ongan lut í hesum Løgmanssteypinum. Einki annað felag eigur fleiri enn tvær aktiur í tí, so tað ber framvegis væl til hjá HB at vinna steypið til ognar. Higartil hava teir átt einarætt til bikar, súlur og steyp, sum tað hevur verið kappast um.

Í gjár var ivasamt, um tað fer at bera til at mynda HB álopið við Jákupi á Borg, Rógva Jacosben og Heðini á Lakjuni. Jákup varð skaddur í fótinum í Europa Cup í síðstu viku, og hann hevur einki serligt mót um, at tað skal bera honum til at spæla í morgin:

– Tveir teir fyrstu dagarnar gekk tað skjótt rætta vegin. Eg havi ikki pínu, tá ið eg gangi, og eg havi verið til arbeiðis á Føroya Bjór, har nógv er at gera í hesi vikuni. Mánadagin royndi eg at renna, og tá var pínan so mikið nógv, at eg mátti gevast beinanvegin. Eg fái viðgerð av øllum slagi, og eg vóni, at tað skal bera til at spæla, men akkurát nú havi eg einki serligt mót, vóru boðini frá Jákupi á Borg í gjár.

Tá ið vit fregnast um, hvat læknarnir hava sagt, so svarar Jákup, at teir hava sagt, at einki er brotið, og at tað er upp til hann sjálvan at gera av, um hann er førur fyri at spæla ella ikki.

– Eg havi ikki ilt í liðbondunum. Tað er heldur rundanum hælsinuna, at pínan er so ógvuslig, tá ið eg royni at renna. Men nú fáa vit at síggja, er optimistiska vendingin hjá síðuspælaranum, sum HB illa vil vera fyri uttan í morgin.

Hóast hann møguliga ikki verður við, so sigur Jákup á Borg seg hava gott mót um, at tað hesa ferð skal eydnast HB at vinna finaluna. HB hevur annars tapt tvær tær seinastu ferðirnar, tá ið teir hava verið í steypafinaluni - í 2000 1-0 ímóti GÍ og í 2002 2-1 ímóti NSÍ, sum aftur hesa ferð er mótstøðuliðið.

### Blandingin og viljin

Í síðstu viku vann HB størsta sigur, sum nakað føroyskt felag nakrantíð hevur vunnið í Europa Cup. Sammett við mótstøðuliðið í morgin eigur HB at vera í betri dystarvenjing. NSÍ hevur ikki verið í týdningarmiklum dysti síðani í níggjunda umfarinum í landskappingini. HB hevur síðani tá spælt tvær ferðir í Europa Cup.

Jákup á Borg er nýliga komin aftur í HB, eftir at hann í eitt skifti royndi seg í OB. Hann sigur seg hava lagt til merkis serlig eyðkenni á hesum liðnum:

– Eitt er, at blandingin millum royndar og minni royndar spælarar er so góð. Ungu menninir hava rættuliga víst, at teir eru førir fyri at taka við ábyrgd. Afturat teimum eru spælarar, sum hava verið við í mong ár og tískil hava týdningarmiklu royndirnar. Felags fyri bæði meiri og minni royndu spælararnar er, at teir hava ein vilja at vinna, sum sjáldan er at síggja. Allir berjast fyri hvørjum einasta bólti, staðfestir Jákup á Borg.

Tá ið HB fyri tveimum árum síðani var í finaluni ímóti NSÍ, var ætlanin, at teir skuldu fara inn á Svangaskarð ólavsøkuaftan. Í síðstu løtu var hetta avlýst. Hesa ferð er ætlanin aftur at fara inn á Svangaskarð í kvøld. Við gongdini fyri tveimum árum síðani í huga man lítið vera at ivast í, at HB í kvøld fer á inn á Toftir at leggja síðstu hond á fyrireikingarnar til steypafinaluna í morgin.



# Sophus skal venja VÍF-kvinnurnar

**Nú er greitt, at havnarmaðurin Sophus Dal-Christiansen, næstu tvey árini skal venja kvinnurnar hjá VÍF**

HÓNDBÓLTSVENJARI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sophus Dal-Christiansen hevur drúgvar royndir sum venjara, serliga á kvinnuøkinum, har hann áður hevur roynt seg sum venjara hjá bæði barndómsfelagnum Kyndil og í Neistanum. Sum ein av teimum heilt fáu her á landi, hevur Sophus tikið øll venjaraskeiðini, so ikki kann sigast annað, enn at hann er væl skikkaður til starvið.



*Ein av okkara royndastu hondbóltsvenjarum, Sophus Dal-Christiansen, skal næstu tvey árini venja kvinnurnar hjá VÍF*

### Havnarmenn í Vestmanna

Nú VÍF hevur sett Sophus í starv sum venjara hjá kvinnunum næstu tvey árini, kann staðfestast, at tað eru tveir havnarmenn, sum báðir hava sínar røtur í Kyndli, sum koma at standa á odda fyri kvinnuliðnum og mansliðnum hjá vestmenningum. Fyrr í summar varð Dia Midjord nevnliga settur sum venjari hjá monnunum hjá VÍF, og júst Sophus og Dia vóru báðir venjarar hjá ávíkavíst kvinnunum og monnunum hjá Neistanum seinasta kappingarár.

Tað ljóðaði annars leingi, at tað fór at ganga striltið hjá VÌF at fáa mannað kvinnuliðið hjá sær, tí so nógvar fullu frá. Greitt er, at Nikolina Eyðbjørnsdóttir fer til Spania at royna seg sum yrkisleikara, og eisini sigst, at veteranurin Sóley Mikkelsen gevst við hondbólti á hægsta stigi, umframt at ivasamt var, hvussu tað fór at verða við onkrum av útlendsku leikarunum, sum vóru á kvinnuliðnum hjá VÍF seinasta kappingarár. Nú leiðslan í VÍF hevur sett Sophus í starv, kann hetta óivað tulkast sum um, at spælaragrundarlagi til komandi kappingarár er í lagi. Eyðun Leo, formaður í VÍF, sigur, at tað er nokk av spælarum til liðið, hóast manningin komandi kappingarár neyvan verður eins sterk sum í fjør. Hann leggur tó afturat, at tað verður arbeitt við at styrkja liðið allatíðina.

# 80-ára stjørnur bresta saman

Ólavsøkuaftan klokkan 17.30 verður søguligur fótbóltsdystur á Niðaravølli í Gundadali, har spælarar, sum gjørdu um seg í 80-árunum, fara at dystast.

Eitt suðuroyarlið mannað við leikarum, ið spældu við 1. deild hjá TB og VB í 1980-árunum, og eitt HB-lið somuleiðis mannað við leikarum, ið høvdu síni bestu ár í áttatiárunum, hittast í einum dysti, sum fær gamlar dagar aftur í Gundadal.

TB hevði síni gullár í 70-árunum, men teir megnaðu eisini at gerast meistarar í 1987 skutin framman fyri HB. Árið eftir gjørdist HB føroyameistari við at vinna síðsta dystin á TB. Tvørámenn vóru eisini føroyameistarar í 1980, og HB var føroyameistari í 1981, 1982 og 1990, so tað eru millum bestu liðini um hetta mundið, sum bresta saman á ólav-søku.

VB var fyrstu ferð føroyameistari í 2000, men síðst í 1980-árunum kom eitt nýtt ættarlið fyri seg, sum millum annað gav HB bank í Gundadali. Við á HB-liðnum vera eisini tveir leikarar frá tiltikna B71-liðnum, sum tók øll á bóli við at vinna FM í 1989, so tað verður eitt satt afturljóð frá teirri fortíðini, tá ið tað var skomm at skifta felag.

Tvørábakkin plagdi at vera avtaglaður, tá ið HB og TB høvdu sínar uppgerðir í gomlum døgum. Har standa felagshúsini í dag, so heilt tað sama verður tað neyvan, men søgufróðir fótbóltskennarar munnu helst fáa smílið fram kortini, um teir vitja niðan í Gundadal 28. juli klokkan 17.30.

Atgongdin er ókeypis.



*Ein tann størsta stjørnan á HB-liðnum í áttati og nítiárunum, Gunnar Mohr, verður óivað at síggja á HB-liðnum, sum ólavsøkuaftan skal dystast við eitt suðuroyarlið samansett av fyrrverandi stjørnum hjá VB og TB*

*savnsmynd*

# FSF-tíðindi komin

**Fimta útgáva av tíðarritinum hjá fótbóltssambandinum er komið, og í blaðnum eru fleiri áhugaverdar greinar**

FSF-TÍÐINDI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í nýggjastu útgávuni av FSF-tíðindum ber millum annað til at lesa um, at formaðurin í kappingarnevndini hjá FSF, Bjarki Mohr, í áhugaverdari grein, setur spurning við, um próvtilfarið er haldgott, tá ið kappingarnevndin skal taka støðu til innkomin mál og kærur.

### Videoupptøkur sum próvtilfar

Bjarki Mohr skýtur í grein síni upp, at støða verður tikin til, um tíðin ikki er búgvin til, at videoupptøkur verða nýttar sum próvtilfar, tá ið kappingarnevndin skal taka støðu til ymisk mál. Formaðurin í kappingarnevndini sigur, at nú vit liva í einari tíð við framkomnari tøkni, verða nærum allar hendingar á leikvøllum festar á sjónband. Tað hevði gjørt tað lættari hjá kappingarnevndini at avgreitt innkomin mál, um hesar kundu nýtast sum próvtilfar, og sum hann eisini sigur, so er tað trupult at burturforklára, tað eyga sær.

Ein onnur áhugaverd grein í FSF-tíðindum er greinin hjá varaskrivaranum í FSF, Fríða B. Nielsen, um at FSF komandi ár ætlar sær at seta nøkur av minstukrøvunum hjá UEFA í verk í 2. deild. Í høvuðsheitinum snúgva hesi minstukrøv seg um, at feløgini skulu lúka nøkur minstukrøv, sum fata um ítróttarlig, starvsfólkalig, bygnaðarlig, løgfrøðilig og fíggjarlig krøv. Hesi eru galdandi í fremstu deildini, og til tess at feløg í 2. deild, sum flyta upp í fremstu deildina, ikki skulu fáa ein skelk av hesum krøvum, ætlar FSF at seta nøkur av teimum í verk í 2. deild komandi ár, so at feløgini hava lættari við brynja seg til fremstu deildina.